# Vilja hava fólkaatkvøðu fyrst

Tríggir fjórðingar av teimum íslendsku veljarunum halda, at stjórnin eigur at leggja uppskotið um samráðingar við ES út til fólkaatkvøðu. Tað vísir ein nýggj kanning, sum Caparent Gallup hevur gjørt. Fólk vórðu spurd, hvussu lítla ella stóra áherslu tey leggja á, at stjórnin spyr fólkið, áðrenn hon fer undir samráðingar við ES um limaskap. 76,3 prosent av teimum spurdu svaraðu, at tey leggja stóra áherslu á, at spurningurin kemur til fólkaatkvøðu fyrst. 17,8 prosent svaraðu, at tey leggja lítla ella als onga áherslu á spurningin, og 5,8 prosent hava onga hugsan um spurningin. 1.264 íslendingar vórðu spurdir í kanningini.



# Danskur drongur svínakrím

Í gjárkvøldið bleiv staðfest, at ein seks ára gamal drongur í Vejle er smittaður við svínakrími. Myndugleikarnir vilja ikki siga so nógv um drongin og støðuna hjá honum, men ein talsmaður váttar fyri danska kringvarpinum, at ein drongur úr Vejle er fluttur á sjúkrahús í Odense, og at læknarnir hava staðfest, at hann er smittaður við H1N1, sum eisini verður rópt svínakrím. Drongurin liggur í einrúmi og fær viðgerð, sigur talsmaðurin. Drongurin gongur í einum barnagarði í Vejle, og Heilsustýrið hevur nú kunnað foreldrini at hinum børnunum um støðuna. Týsku heilsumyndugleikarnir søgdu í morgun, at teir hava staðfest 27 tilburðir av H1N1 á einum skúla.



*Enn hava føroyskir politikarar ikki verið nóg vaksnir til at ásanna, at hetta er ikki tíðin at tosa um sparingar. Tað er í tíðum, sum hesari, at politikarar skulu taka sína ábyrgd og lata tað almenna taka skuldina av herðunum á borgarunum, staðfestir Hermann Oskarsson, búskaparfrøðingur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Sosialurin í morgin:

# Higartil hevur tað bara gingið galið

**– Tað er humbukk at tosa um, at Føroyar fara at enda í eini skuldarfellu, tí eini slíkari støðu eru vit ikki nær í námind av at koma í.**

**Tað sigur Hermann Oskarsson í samrøðu við Sosialin í morgin.**

**– At skapa slíkan pannikk í Føroyum tænir bara einum endamáli og tað er at halda fast um førda politikkin-sum er skeivur.**

**Búskaparfrøðingurin heldur eisini, at tað er margháttligt, at tað nú skal vera blivið eitt mótaorð í føroyskum politikki, at vit hava eitt bygnaðarligt hall á fíggjarlógini, sum skal burtur.**

**– Tað ljóðar kanska fínt at siga so, men veruleikin er, at ongin hevur nakrantíð roknað út, um vit yvirhøvur hava eitt bygnaðarligt hall og enn minni hevur nakar roknað út, hvussu stór tað er.**

**Hann sigur, at tann politikkurin, sum landsins leiðarar hava fráboðað, er ein kensluleysur politikkur og hann heldur bart út, at politikarar svíkja vanliga borgaran við teimum ætlanum, teir hava stungið út í kortið.**

**– Higartil hevur tað bara gingið galið, staðfestir Hermann Oskarsson**

gera sítt til, at fólk fara at rýma av landinum.

Og tað er ein vanlukka av dimensjónum.

### Tvøroyri eitt gott dømi

Hann sigur, at feskasta dømi um hetta, er støðan, sum Tvøroyrar kommuna er komin í, har eini 14 fólk eru søgd upp, tí at kommunan er noydd at spara.

- Heldur enn at koyra fleiri fólk út í arbeiðsloysi, hevði tað verið skilabetri, at latið Tvøroyrar Kommunu sloppið at vaksið um skuldarbyrðuna tey næstu fáu árini, til tíðirnar batna aftur, tí kommunan kann brúka ein mansaldur ella meiri, upp á at betala skuldina aftur.

Men fyri tey 14 fólkini, sum eru uppsøgd, er støðan ein heilt onnur. Tey hava mist arbeiði, summi eru kanska í vanda fyri at missa hús og heim og vandi er eisini fyri, at onkur teirra rýmir og tað er ein vanlukka, sigur búskaparfrøðingurin.

Hermann Oskarsson staðfestir, at landskassin í Føroyum er væl fyri at átaka sær eina skuld, tí tað almenna hevur onga skuld frammanundan.

- Í so máta eru vit so ómetaliga væl betri fyri enn okkara grannalond eru, har fleiri av teimum hava stóra skuld at dragast við frammanundan.

Í Sosialinum í morgin hava vit eina drúgvari samrøðu við Hermann Oskarsson um kreppuna, um hvørji krepputiltøk kunnu setast í verk og um, hvørji tey størstu vandamálini eru.